# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dómadagstala ella konstruktiv hugskot

Tónin frá ávísum landsstýrismonnum og tingmonnum er vorðin munandi hvassari í seinastuni og minnir nú mest um dómadagstalu. Búskaparliga støðan er stútt versnandi, arbeiðsloysið vaksandi og fíggjarstøða landskassans er sera álvarsom. Hallið á løgtingsfíggjarlógini verður í ár umleið 740 milliónir og verða ikki tiltøk sett í verk, so verður hallið at runda milliardina fíggjarárið 2010. Hjá kommununum er støðan lítið mætari.

Tað tykist, sum landspolitikkarar eru vaknaðir við kaldan dreym. Tað eru ikki nógvir mánaðir síðan, at hesir somu, fylgdir av toppembætismonnum komu við sissandi boðum um, at her stóð væl til. Vit vóru so væl fyri, at eingin orsøk var til órógv. Hetta kom alt frá somu persónum, sum við opnum eygum hava rikið ein fiskivinnupolitikk, sum beinleiðis leiðir í óføri, sum hava minkað um blokk og givið skattalættar og eggjað til brúkaraveitslu. Fiskivinnupolitikkurin er alfa og omega í hesum landi. Rekur hesin politikkur fyri vág og vind, so verður úrslitið hareftir. Tað síggja vit nú, ið svíður sum svøllur. Onnur stórmál liggja á láni ella eru læst í klandri.

Nú eru so samgongupolitikkarar raknaðir við og tað við lít. Sum altíð í kreppu eru politikkarar til reiðar við tiltøkum, ið skulu skerja og tálma. Politikkarar tykjast hava ta fatan, at koma teir í krepputíðum við tiltøkum, sum merkjast, fyri ikki um at tala, pína, so virkar alt betur, og so verður øll venjingin tikin í størri álvara. Hetta er so tað tað er. Verri er, tá talan er um konstruktiv hugskot til tess at venda gongdini til tað betra. Hørðu tiltøkini hjálpa kanska uppá reyðu tølini, men tey fáa ongar tómar hendur í vinnu – heldur er tað tvørturímóti. Kreppupolitikkur krevur greið mál og eina miðvísa kreppustrategi, sum greitt kann vísa fram móti ljósari tíðum. Um fólk fáa eina vón um, at alt verður betri, er tað kanska lættari at góðtaka tann beiska búskaparliga heilivági, sum nú verður blandaður.

Annars virkar samgongan ikki væl trimmað til at fara í hornatøk við kreppuna. Klandur og stríð, mótstríðandi útmeldingar og orðadráttir millum lansstýris- og samgongulimur í almenna rúminum eyðkenna politiska gerandisdagin. Meðan løgmaður og fíggjarmálaráðharri mæla til at spenna beltini inn og krevja strong tiltøk, talar og bera onkur annar seg at sum um einki er hent. Tað gerst alt meira greitt, at í samgonguni er ein innanhýsis andstøða, sum er djúpt ósamd við rikna politikkin. Okkum tørvar ikki skrekkpropaganda. Okkum tørvar ein konstruktivan og kreativan fíggjar- vinnu- og búskaparpolitikk, sum kann seta mót í fólk og vinnulív. Okkum tørvar t.d. eina rættvísan skatta- og avgjaldskipan, ein heilt nýggja fiskivinnupolitikk og ein samhaldsfastan almannapolitikk – okkum tørvar ES avklaring. Nú er komið hartil, at ABC samgongan má semjast, savna seg um sínar aðaluppgávur og liva upp til ta stóru og tungu ábyrgd hon hevur átikið sær. Enn er ikki ov seint .

**Sosialurin**

## Hvussu fáa vit eina tryggari lufthavn í Føroyum?

**BJARNI DEBESS**

Tey ræðandi tíðindi, sum gjøgnum árini hava verið um Vága Lufthavn skuldi verið nóg góð grund til, at okkara mydugleikar í lufthavnsmálinum muga saðla um og taka trygdina av flogførum og ferðafólki, sum lenda og lætta í Føroyum í álvara.

Tá kannað verður, hvussu løtt, trupul ella vandamikil ein lufthavn er fyri flogfør at koma til og fara frá, so er tað eitt kanningararbeiði, sum eigur at vera gjørt av serkønum og óheftum fólki.

Vága lufthavn er civil lufthavn t.v.s. til freðamannaflogfør, trafikkflogfør á fakmáli. Til ferðamannaflutning á sjónum á landi og í luftini eru størstu trygdarkrøv galdandi í okkara parti av heiminum.

Í samband við flúgving upp á Vága Lufthavn, eru fleiri vanlukkur hendar og uppaftur fleiri næstan vanlukkur, síðani ferðamannaflúgving tók seg upp. Nevndu heiti eru á flogmáli, í heilt stuttum soleiðis: Tá flúgvari kemur illa fyri, og fólk doyggja, kallast tað vanlukka. Tá flúgvari kemur illa fyri, og fólk ikki doyggja kallast tað næstan vanlukka. Báði hesi sløg av vanlukkum vera mettar nærum eins. Sjálvasagt blíva fleiri onnur benevnillsi brúkt, tá so er. Fólk, flúgvari og annað kemur jú ofta til skaða bæði tá vanlukkur og næstan ólukkur henda.

Er Vága Lufthavn við sínum uttara umhvørvi ein vandamikil lufthavn, og at lufthavnsmálið kanska er blivið so politiskt, soleiðis at politikararnir, nú útbygging er á skránni, ikki hætta sær at saðla um og byggja lufthavn á sikrari stað, so er at siga sum er. Eg undirritaði, haldi tað vera best at kanningar verða gjørdar soleiðis, at Vága Lufthavn kann vurderast. Tað er kanska ikki annað enn rætt og rímuligt at fólkið í Føroyum, Danmark og í útheiminum, sum ætla at ferðast um hesa lufthavn fáa møguleika at kunna seg um, hvønn status Lufthavnin - okkar einasta – hevur í trygdarhøpi.

Eg vil halda, at tíðin er komin hartil, at staðfestast má, hvørjum trygdarstøði Lufthavnin er á, og at tað er Landsstýrið sum ognari av bæði floghavn og flúgvarum, ið setur eina rannsóknarnevnd sum í fyrsta lagi skal finna fram og telja allar skaðar saman, sum eru hendir í lufthavnini, nærumhvørvinum og uttara umhvørvinum.

Upp í uttara umhvørvi teljast her: Mykines, Tindholmur, Vágoyggj í vestri, Sørvágsfjørður, øki, fjøll og berg norðan fyri og sunnan fyri fjørðin.

Upp í innara umhvørvi telist: Innari partur av Sørvágsfjørði, fjøll og berg norðan fyri og sunnan fyri fjørðin, lufthavnsøki/flogbreyt og fjøll/berg runt fufthavnina.

Tað er í hesum omanfyri nevndu økjum, at ransóknarnevndin skal finna tær sokallaðu vanlukkur og næstan vanlukkur, sum hendar eru í samband við Vága Lufthavn.

Í øðrum lagi skal rannsóknarnevndin bara kanna og telja saman, hvussu mong flogfør, sum eru komin og farin um lufthavnina. Hetta kallast frekvens, -títtleiki. Tað er stutt og greitt talið av flogførum um lufthavnina í mun til vanlukkurnar, sum eru bestemmandi fyri, hvussu vandamikil ein lufthavn er.

Landsstýrið eigur ikki at gloyma tey, sum farin eru á henda hátt og tey sum skadd blivu. Vanlukkurnar eru hendar við fleiri flogførum og fleiri helikoptarum. Øll vóru tey kanska úr báðum londum, Føroyum og Danmark. Tey vildu náa lufthavn og land okkara, tað gjørdu tey ikki, í stað liðu tey “En brat og voldsom død” og onnur illa løstað.

At byggja flogbreytina út í Vágum er kanska eitt váðaverk, tí stór flogfør skapa stórar vanlukkur, um tað gongur galið.

Fólk snakka um mjørka og turbulens. Her er munurin bókstaviliga sum nátt og dagur, mjørkan síggja vit, men turbulensin, sum er tað farligasta, síggja vit ikki.

Hotell og onnur gremja seg um at minkandi turisman er ein katastrofa. Tað hevur helst fleiri grundir. Kanska liggur ein av teimum í Vága Lufthavn. Til dømis kundi franska landsholdið, heimaftur komið, boðað sínum landsmonnum og øðrum frá, at tað var meira lukkan enn føroyska forstandið, sum gjørdi, at teir ikki komu heimaftur í trækassa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gera nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.